dag frá degi

Føroyar eru ótømandi

— fyri tey, sum vilja taka myndir

Orðini: »Føroyar eru ótømandi fyri tey, sum vilja taka myndir« koma frá myndatakaranum Ásmundi Poulsen, sum í hesum døgum gevur út eina myndabók »Føroyar í myndum«.

Tað eru 10 ár síðani Ásmundur gav sína fyrstu myndabók út. Tilsamans eru hesar fimm bøkur prentaðar í 40.000 eintøkum.

Nýggjasta bókin er prentað í Noregi, men satsurin er settur hjá Einars Prent. Bókin er prentað í 8000 eintøkum og kostar innbundin 68 kr. í bókabúðunum. Hans Thomsen hevur skrivað tekstin til bókina.

Bókin líkist ikki heilt teimum undanfarnu.

— Eg helt, at myndirnar skuldu vera størri, so tær taka seg betur út. Tí eru myndirnar umleið 25 prosent størri í hesi nýggjastu myndabókini, sigur Ásmundur.

Vit munnu vera mong, ið halda okkum duga framúr væl at finna tey røttu motivini og taka góðar myndir, tí vit eina ella tvær reisir hava tikið góðar myndir. Men so heilt einfalt er tað ikki. Skal tú veruliga fáa nakað burtur úr sum myndatakari, so ræður fyrst og fremst um at vera hegnigur, tolin og arbeiðssamur.

Hetta kann sigast um Ásmund og myndir hansara — og júst henda nýggjasta myndabókin, ber prógv um tað. Her eru framúr góðar myndir við fjølbroyttum motivum.


Ásmundur sigur sjálvur um arbeiði sítt sum myndatakari, at tað hevur verið sera áhugavert, spennandi og ein stór gleði fyri seg persónliga.

— Mær dámar at vísa øðrum, hvussu tað sær út í okkara náttúru, men tað hevur samstundis verið ein stór gleði fyri meg sjálvan at arbeiða við hesum.

Ásmundur sigur um hesa nýggju bókina, at hóast nógvar av myndunum líkjast øðrum myndum, sum hann hevur tikið fyrr, so eru allar nýggjar myndir. — Bókin er fyrst og fremst ætlað útlendingum, og tað eru tí ávís pláss, sum koma aftur í bókunum, sigur Ásmundur.



Ásmundur Poulsen, myndatakari



dagbókin

Missiónshúsið við Landavegin

Í annaðkvøld kl. 17.30 er sangvenjing fyri børn. Kl. 20.00 verður møti.

KFUK, Tórshavn

Í kvøld kl. 20.00 verður hugnalig samkoma fyri teimum, sum hava arbeitt til basarin og teimum sum hjálptu við í basarinum.

Sjómanskvinnuringurin í Havn

Sjómanskvinnuringurin kemur saman á sjómansheiminum í annaðkvøld, hóskvøldið kl. 20.00 í staðin fyri í kvøld.

Frelsunarherurin

Í kvøld kl. 20.00 er ungdómsklubbi í Frelsunnarherinum.

Evangeliihúsið

Missiónsmøti í annaðkvøld kl. 20.

Missiónshúsið í Søldarfirði

Í kvøld kl. 20 talar Heri Tróndheim. Rituvíkingar syngja.

Soli Deo Gloria

Í kvøld kl. 20.00 er andakt við Egil Askham.

Sjómanskvinnuringurin á Tvøroyri

Sjómanskvinnuringurin kemur saman í annaðkvøld, hóskvøldið, kl. 20 hjá Tove Hammer.

Missiónshúsið í Sumba

Missiónsvikan heldur fram. Í kvøld og í annað kvøld kl. 20.00 talar Høgni Poulsen, prestur.

Friggjakvøldið kl. 20.00 talar Sofus Sivertsen.


Sjónvarpsfelagið

Aðalfundurin verður í kvøld kl. 20 í auluni á Føroya Læraraskúla.

Jólabingo

Pensionistafelagið skipar fyri almennum bingospæli í SMS í kvøld kl. 19.30.

útvarp føroya




Umframt føstu sendingarnar:
07.15: Veðurtíðindi
07.17: Morgunlestur
07.30: Veðurtíðindi og tíðindi
07.35: Tónleikur
08.00: Veðurtíðindi og tíðindi
08.05: Lurtararnir og vit spæla grammofon
09.00: Veðurtíðindi og tíðindi
09.05: Morgunlestur
12.00: Middagskonsert
12.20: Veðurtíðindi og tíðindi
12.32: Døgurðatónleikur
12.50: Veðurtíðindi
12.51: Tónleikur
18.30: Veðurtíðindi og tíðindi

Mikudagur 6.
08.05: Enskt 6 11. sending
13.00: Kvøðuljómar til sjófólkið
18.42: Nátturðatónleikur
19.00: Miðvikan
20.00: Grammofongestur á Bryggjubakka Jákup Jakobsen, 4. og seinasta sending
20.40: Enskt 6 11. sending
21.00: Veðurtíðindi og tíðindi

Hósdagur 7.
18.42: Læknin hevur orðið
19.00: Lagnan 42. partur av framhaldssøguni eftir Richard. B. Thomsen. Hans Thomsen umsetir, Olivur Næss lesur
19.30: Poppur
20.00: Fiskivinnutátturin
20.20: Føroysk kirkjuorgul. II: Janus Mohr leggur til rættis.
21.00: Veðurtíðindi og tíðindi

Friggjadagur 8.
18.42: Nátturðatónleikur
19.00: Um tónleik. Tann fyrsti fleirrøddaði tónleikurin. Jógvan T. Joensen greiðir frá.
19.30: Sangarin Mario Lanza Ove Olsen
20.00: Friggjakvøld kl. 20
21.00: Veðurtíðindi og tíðindi



Loysnin av krossorðinum í seinasta blaði